Vikuskiftis Sosialurin


# Gera vit frísk børn sjúk ella sjúk børn frísk ?

JÓNA MORTENSEN



Las í Dimmu 11. mars greinina »Vit gera frísk børn sjúk«.

So sum eg skilji greinina, skulu vit fara frá at oyramerkja dreingir, sum hava ta sokallaðu skúkuna ADHD til at taka teir sum vanligir buldrasligir dreingir. Eg var til eitt sokallað seminar á læraraskúlanum, sum Sernámsdepilin skipaði fyri, fyri nøkrum árum síðani. Temaði á semenarinum var »børn við ADHD«, tað var professarin Christopher Gilberg, sum helt hettar sera áhugaverda semenar. Í stuttum snúði tað seg um at kunna foreldur, lærarar, pedagogar um, hvussu eitt barn við ADHD hevur tað. Hvussu skeivt tað er, tá vit koyra hesi børn í tann bólkin sum eitir »buldrasligir dreingir« (tað er sum oftast dreingir, ið hava hesa sjúku). Tí undrar tað meg, at akkurát hendan greinin kemur frá Sernámsdeplinun.

Vit sum kenna til børn við hesi sjúku vita væl, at tað er óalmindiliga langt frá at vera buldrasligur, til at hava hesa sjúku. Børninini hava tað ikki nemt, tí tey verða uppfatað sum óupdrigin og buldraslig. Tað vísir seg eisini, at nógv vaksin, sum ongantíð hava fingið hjálp fyri sjúkuna, men tvørturímóti eru skírd buldraslig og óupdrigin, gerast misnýtarar og liva á »livets skyggeside«, sum man tekur til. Hesi hava fyri tað mesta staðið uttan fyri skúlastovuna í tímunum, tí eingin helt tey út. Sjálvsvirið er lágt, og ofta eru tey illa fyri fakliga, og tí tey detta niðurímillum.

**»Myte: »ADHD er blot en diagnose, som det er let for læger at hæfte på vanskelige børn.«**
Fakta: ADHD har været en anerkendt sygdom i mange år. Men fordi lægerne får større og større forståelse af sygdommen og bliver bedre til at identificere den, er ADHD-diagnosen mere almindelig nu, end tidligere. I USA diagnosticeres 3-5 % af befolkningen hvert år med ADHD.«

Sjálvandi skal ein fokusera uppá, hvussu hesi børn kunnu hjálpast. Bara í Danmark hava tey fleiri skúlar fyri børn við ADHD, so tað er bara at hyggja hvussu tey gera har, tí úrslitini eru sera góð. At hava ein dag um vikuna úti í náttúrini ella okkurt annað, og so hinar dagarnar vanliga skúlagongd, er ikki gott nokk. Hesi børn klára ikki eina »vanliga« skúlagongd, megna ikki at samla seg so leingi í senn og sita still so leingi í senn. Uppá sama máta sum lærarar nú taka útbúgving í, hvussu ein undirvísir børnum, sum eru orðblind, mugu tey sum skulu undirvísa børnum við ADHD eisini hava eina serútbúgving. Tað er ikki nóg mikið at seta onkran sum hevur gott tol at taka sær av hesum, nei her má nakað serligt til. Vit eru so afturútsild á hesum øki sum er, so lat okkum ikki fara enn longur aftur við at koyra hesi børn/dreingir undir bara at vera »buldrasligir«.

# Barometrið og termometrið (ll) ella et tosi satt

HERI MOHR



Í greinini Barometrið og Termometrið varð asnasparkið, løgmansstjórin fekk frá chefideologinum í loysingarrørsluni, umrøtt. Hendan gerðin má í sjálvum sær haldast at hava lítið við vanligan, góðan fólkasið at gera og hvaðna minni at hava røtur í føroyskari mentan. Og var tað ikki júst hetta rákið, ið tók seg upp fyri skjótt fjórðings øld síðani, og sum rættiliga kom til sjóndar í 1998-2003? Ein sannur øsingarpolitikkur við ósannindum og villleiðingum. Ein politikkur, sum ikki sampakkar við vanliga fatan av demokratii.

Í 1999 gav landsstýrið út bókina ”Hvítabók”. Nú ellivu ár eru liðin, er tað áhugavert at lesa hesa bók, kanska serliga brotini Støðuginntøka og ein Búskapargrunnur (síðu 146-149). Ynskidreymar, sum minna okkum ikki sørt um søguna hjá H. C. Andersen: Konan við eggjunum og hønuni. Og árið eftir gav landsstýrið út bóklingin ”Frá heimastýri til fullveldi.” Hann kom í hvørt heim. Veruleikafjarur við frágreiðing um, hví og hvussu landskassin hevði ikki brúk fyri blokkinum, og at hann tessvegna skuldi samansparast til ella um búskapurin ”verður fyri afturgongd.” Hetta postulatið um landskassans inntøkur og útreiðslur má haldast at vera so ósatt og veruleikafjart, – í dag er tað syndarliga prógvað –, at tað ongantíð átti at verið tikið í fullum álvara.

Tvey ár seinri byrjaði sama landsstýri, sum skuldi samanspara almennan pening, bókstaviliga at tveita almennan pening fyri borð, og hesin ørskapur hevur staðið við ár um ár nú á níggjunda ári. Hvussu í allari víðu verð skal okkara lóggávuting kunna virka optimalt fyri samfelagið og fólkið undir slíkum umstøðum?

Orðini , ”tey vita ikki, hvat tey gera”, er eingin uggi.

Tjóðskaparliga vekingin fyri 120 árum síðani, sum kveikti nýtt og dýrabart lív og kenslur í ta føroysku fólkasálina, varð inngangurin til okkara gulløld. Tað námið gav okkum ómetaliga nógv. Men vandi er í hvørjari vælferð. Politikkur fekk heimarætt í ”føroyskari mentan”. Nógv broyttist. Eisini tað annars so óspilta sinnalagið. Barnsligt sjálvrós, sjálvgleði, øvund og idiotisk nalvaskoðan hava sett og seta áhaldandi djúp og greflig spor. Tað tykist, sum føroyingar eru vorðnir avskildraðir í básar: Tey (há)mentaðu. Rættir føroyingar (politiskt frelstir). Og – hini. Mentalt liva vit veruliga í kafkanskum terrori. Franz Kafka (1883-1924) skrivaði skaldsøgur um ta sálarligu týningina, um processina, í einum ”framkomnum” samfelagi.

Ein smøl, men djúp gjógv er uppstaðin. Øðrumegin gjónna eru tey (há) mentaðu og rættir føroyingar, og hinumegin ”hini”. Vit ímynda okkum Don Quijote við langspjóti á hestbaki og Sancho Panza, landshøvdingur á Barataria, við Dulcineu undir liðini skoðandi yvir gjónna.

Við yvirtøkum av ymiskum málsøkjum (skúlaverkið v.m.) fekk løgtingið nógvar stórar bygningar ókeypis frá ríkisstjórnini. Hesir bygningar, ið allir verða brúktir til upprunalig endamál, eru ikki skrásettir í landskassans ársroknskapum, hvør orsøkin so kann vera. Man tað vera so galið, at løgtingið hevur ”gloymt” at játta pening til gjaldið fyri tinglesing av eigararskiftunum av hesum mongu ognum? Og nær er Føroya fólk kunnað um hesar stórfingnu gávur? Og nær hevur løgtingið takkað Føroya fólks vegna fyri gávurnar? Og hvar eru fjølmiðlarnir í øllum hesum? Snorksova okkara journalistar?

Tað er eitt mentalt fyribrigdi at kreppa tærnar. Rættiliga álvarsligt gerst hetta, tá ið tað rámar eitt heilt fólk!

Spurningarnir eru legio á øllum økjum. Eitt nú: Fyrikemur málslig og politisk indoktrinering í føroyskum skúlum? Og hvat skilja vit við indoktrinering? Hvat vísir tað mentala termometrið í skúlunum? (Hetta ljóðar sum ein skrivlig uppgáva til próvtøku í 3.g.)

Í 1947 skrivaði tann háttvirdi amerikanski uttanríkisráðharrin James F. Burnes (1881-1972) sínar endurminningar Speaking Frankly (Eg tosi satt). Í innganginum til endurminningarnar endurgevur hann nøkur orð hjá Abraham Lincoln: ”Um vit vistu, hvar vit eru, og hvørja leið gongdin ber, kunnu vit betur avgera, hvat vit skulu gera, og hvussu vit skulu gera.”

Í tí politiska mjørkanum, sum í løtuni tykist at gera gongulagið trilvandi, er tað umráðandi, at okkara politiska fyrisiting hevur grundleggjandi eginleikar, sum tryggja demokratiið og trivnaðin hjá tí einstaka borgaranum í okkara lítla samfelag. Eginleikir fram um allar eru: (1) Sannføring í hásæti, tí lygn og villleiðing er av tí ónda og ger lívið til eina marru. (2) Vanligt vit og skil. (3) Politikarar í meginfyrisitingini við løgmanni og landsstýrisfólkum mugu vera virðilig umboð Føroya fólks bæði úti og heima.(4) Karakterstyrki og vilji eru sjálvsagdir eginleikar. (5) Loyalitetur í meginfyrisitingini, líka mikið hvussu landsstýrið er samansett.

Løgmaður hevur prógvað, at allir góðir eginleikar hava heimarætt í Tinganesi. Tessvegna er tað rímiligt at halda, at verandi manning er før fyri at loysa vandamál og tryggja skúlaverkinum. heilsuverkinum og almannaverkinum góðar umstøður til tess, at ung og gomul og sjúk og brekað fáa trygg livikor í Føroyum.

Uttan óneyðugt kjak og klandur mugu løgmaður og hansara manning spyrja sum Abraham Lincoln:

Hvar – hvørja – hvat – hvussu? Og virka har útfrá.

Tað ber til. Tað skal bera til, tí omanfyri nevndu eginleikar hava, sum nú er, góðar umstøður. Og veruliga føroysk mentan er aftur sloppin til háborðs.

## Heimsins týdningarmesta starv

# 5 ára lønarsteðg og 5 ára setanarsteðg!

MAUD WANG HANSEN



Hetta eru ikki góð boð at fáa nú, bert eitt hálvt ár undan, at Føroya Pedagogfelag fer undir nýggjar sáttmálasamráðingar aftur.

Tað er tí alneyðugt, at vit, sum eru limir í Føroya Pedagogfelag, minnast, hvat tað eru fyri uppgávur, vit loysa, og hvussu stóran týdning okkara arbeiði hevur fyri alt samfelagið. Tað er mín meting, at námsfrøðiliga arbeiði er tað týdningarmesta arbeiðið í heiminum. At arbeiða við menninskjum er í sær sjálvum ein stór avbjóðing, og at gera tað rætta er eitt ófrávíkiligt krav til okkum dagliga. Tað er eingin orðsøk til at drýpa høvur, tá tú verður spurd, hvat títt starv er. Heldur skalt tú stolt rætta ryggin og halda pannuna høgt og svara, at tú hevur heimsins týdningarmesta starv.

Tíðin er farin frá at tosa um ansing. Námsfrøði er alt annað enn tað. Námsfrøði er at vera tann, sum sær menniskjað sum eitt heilt menniskja og veit, hvat skal til fyri at skapa menning og trivna fyri hvønn einstakan. Námsfrøði er at síggja, hvønn tørv tann einstaki hevur á hjálp og stuðli. Námsfrøði er eisini at skapa møguleika fyri, at tann einstaki kann læra at virka sum sosialt menniskja og duga at fyrihalda seg til sín sjálvs og til sítt umhvørvi.

Nú er stundin komin til at fáa boðskapin út um, at námsfrøðiliga arbeiðið krevur góða fyrireiking, og at tey, sum dagliga eru á kommunalum dagstovnum ella á dag- og samdøgursstovnum landsins, eru okkara størsta íløga í framtíðina. Vit vija ikki liggja undir fyri politiskum klandri um, hvussu landsbúskapurin skal rekast. Vit vilja hava virðiligar arbeiðsumstøður, eina høskandi løn og eftirløn og eina arbeiðstíð, sum menniskjansliga tekur atlit fyri, at vit skulu vera virkin í nógv ár á arbeiðsmarknaðinum.

Fyri limirnar í Føroya Pedagogfelag er tað tí umráðandi:

- At samráðingar millum felag og arbeiðsgevarar ikki verða politiskt órógvaðar frammanundan
- At týdningrmesta starv í heiminum verður virðismett og vælønt
- At námsfrøðin kemur í fremstu røð, og at talan er um ein uppibornan fakligan stoltleika
- At tíð til fyrireiking er eitt ófrávíkiligt krav, tá talan er um menning og dokumentatión
- At arbeiðsbyrðan má tillagast og fordeilast á fleiri hendur, alternativt má arbeiðsvikan styttast

Góðu limir í Føroya Pedagogfelag, eg ivist ikki í, hvat skal til, fyri at vit koma á mál við okkara ynskjum. Vónandi ivast tit heldur ikki og vilja taka undir við mær, tá eg sigi, at nú skulu vit seta dagskránna og orða námsfrøðina og luttaka, har orðaskifti er um heimsins týdningarmesta starv. Samfelagið hevur brúk fyri tær og tínari tænastu.